# <u>Vegleiðing um upplýsingar, tá søkt verður um skuldarumskipan</u>

Í hesum faldara verður í stuttum greitt frá, hvørjar upplýsingar eru kravdar, fyri at ein umsókn um skuldarumskipan verður viðgjørd.

Føroya Kærustovnur virkar sum skrivstova hjá Skuldarumskipanarnevndini, og tí skulu umsóknir um skuldarumskipan sendast til Føroya Kærustovn, undir Hornabakka, Postsmoga 45, 110 Tórshavn.

Umsókn um skuldarumskipan skal vera skrivlig.

**<u>Umsóknarblað</u>** fæst við at venda sær til Kærustovnin ella á heimasíðuni hjá Kærustovninum www.kaerustovnur.fo

Tað er sera umráðandi, at tygum útfylla umsóknarblaðið nágreiniliga. Umsóknarblaðið skal innihalda allar upplýsingar um øll viðurskifti, sum spurt verður um á umsóknarblaðnum. Um upplýsingar mangla, verða tygum í fyrstu atløgu biðin um at koma við mangalndi upplýsingunum. Um tygum ikki koma við øllum upplýsingunum, kann henda, at umsóknin verður avvíst av Skuldarumskipanarnevndini av hesi orsøk.

Tað er umráðandi, at tygum greiða frá, hvussu skuldin er íkomin, og hvussu gomul skuldin er. Tað er eisini umráðandi, at tygum eru fúsur til at koma við fleiri upplýsingum, um Kærustovnurin biður um tær.

Inntøkur og útreiðslur skulu vera ásettar pr. mánaða. Er talan um árligar ella kvartalsvísar útreiðslur, skulu tygum rokna út meðal mánaðarligu upphæddina og seta hana á umsóknarblaðið. Inntøkan skal eisini ásetast sum ein miðal mánaðarlig inntøka.

**<u>Saman við umsóknarblaðnum skulu hesi skjøl eisini sendast við:</u>**
Um umsøkjarin er giftur ella sambúgvandi, skulu somu skjøl sendast inn fyri hjúnafelagan ella sambúgvan.

<u>Prógvaðar inntøkur hjá umsøkjara og hjúnafelaga/sambúgva:</u>
Lønarseðlar fyri seinastu 3 mánaðirnar,
Skattauppgerðir fyri 3 seinastu árini,
Roknskapir fyri 3 tey seinastu árini (um B-inntøkur eru).

<u>Prógvaðar útreiðslur hjá umsøkjara og hjúnafelaga/sambúgva:</u>
Fíggjaryvirlit frá peningastovni,
Kontoavrit frá Betalingservice (BS),
Kontoavrit frá peningastovnum.

<u>Ogn hjá umsøkjara og hjúnafelaga/sambúgva:</u>
Føst ogn:
Um umsøkjarin eigur fasta ogn/sethús, jørð, neyst o.a., skal avrit av tingbóksupplýsingum (fæst við at venda sær til Tinglýsingina) fylgja við.

Leysafæ:
Um umsøkjarin eigur leysafæ, bilar, bátar, o.a., skal umsøkjarin senda inn skjalprógv uppá virðið á hesum, t.d. upplýst í tryggingarpappírum o.ø.

<u>Skuld hjá umsøkjara og hjúnafelaga/sambúgva:</u>
Umsøkjarin skal senda inn avrit av øllum lánsupplýsingum. Eisini avrit av lániskjølum og kontoavritum.
Um umsøkjarin hevur aðra leysaskuld, er umráðandi, at vit fáa upplýsingar og skjalprógv uppá alla hesa skuld (rokningar, rykkjarar, kautiónir o.a.).

Upplýsast skal eisini, um umsøkjarin rindar niður uppá hesa skuld.

<u>Umsøkjarin undir útbúgving:</u>
Um umsøkjarin er undir útbúgving, skal umsøkjarin fáa eina skrivliga váttan frá skúlanum um, nær væntast kann, at útbúgvingin er liðug.

<u>Um bæði umsøkjari og hjúnafelagi/sambúgvi søkja um skuldarumskipan:</u>
Um bæði umsøkjari og hjúnafelagi/sambúgvi søkja um skuldarumskipan, skulu hesi søkja hvør sær. Umráðandi er tó at upplýsa, um hjúnafelagin/sambúgvin eisini ætlar/fer at søkja um skuldarumskipan. (Hetta soleiðis at hesar umsóknir kunnu viðgerast samstundis).

**Orsøkin til, at Skuldarumskipanarnevndin vil hava allar hesar upplýsingar, er, at hon ynskir at fáa eina rættvísandi mynd av fíggjarligu umstøðunum hjá umsøkjaranum.**